Viðmerking:

# ES-marknaðurin og BIP støð í Tórshavn

*Aftursvar til Hergeir Nielsen løgtingsmann*



Takk fyri viðmerkingar tínar til skriv mítt viðv. BIP-punkti í Tórshavn. Grein tín er væl skild, Hergeir, – men eg haldi tó ikki, at eg fekk svar uppá trupulleikan, sum kemur at stinga seg upp, tá hetta BIP punkt verður veruleiki!!! Tú sigur at tað enn ikki er avgjørt, hvar BIP punktið skal liggja??? Hetta er skeivt, tí tað stendur út-trykkiliga í uppskotinum, sum bleiv samtykt á síðu 5, 4. reglubrot: »Viðmerkt er í tilmælinum, at ætlanin er at ein MES (BIP støð) skal vera í Tórshavn, sum er høvuðsinnflutningshavn í Føroyum«. T.v.s. – støðin skal vera í Tórshavn!!!

Nú spyrji eg: hvat við vøru, sum er framleidd í triðjalondum, so sum bananir, oksakjøt, seyðakjøt osfr., sum skal til t.d. Tvøroyrar, Klaksvíkar, Vágarnar etc. – hetta skal væl alt yvir BIP punkt í Havn. Vøran kann also ikki leggjast upp í útjaðaranum uttan eisini BIP punkt eru har ella hvussu???

Tá vit ella aðrar frystigoymslur fáa t.d. transitvørur (vanliga væl pakkaðar vørur frá skipum, ið summi er ES góðkend og onnur ikki hava ES-góðkenning):

- verður skipið, sum ikki er ES-góðkent, so avvíst og má ikki umleggja veiðuna í Føroyum, – eisini sjálvt um vøran ikki kemur í nánd av ES-marknaðinum
  (svar ynskist)
- Triðja lands vøra sum t.d. sild ella makrelur frá góðkendum skipi skal landast í transit á goymslu uttan fyri Havnina, – hendan vøra skal øll via BIP punktið í Havn, t.v.s. t.d. 7-800 tons, lossast og síðani koyrast á ætlaðu goymsluna ella hvussu?? Hetta ger seg eisini galdandi um vøran ikki kemur í nánd av ES???
  (svar ynskist)
- Hvat við øllum russiskum og baltiskum skipum, sum umskipa veiðu sína innan fyri havnamerkið á føroyskum firðum, skulu hesi skip avvísast framyvir, tá tey ikki eru góðkend, ella hvussu???
  (svar ynskist)

Enn hevur ongin av teimum, eg havi spurt og sum skuldu vita alt um hesa avtalu, kunnað svara mær uppá hesar spurningar, – men vónandi fæst svar í nærmastu framtíð??!!

Lat meg síðan fáa nøkur ting uppá tað reina viðv. ES-heilsukrøvunum: Mær vitandi hava vit eina sera vælvirkandi Heilsufrøðiliga Starvsstovu eins og ein sera kompetentan fiskaframleiðsluídna, sum ivaleyst allir lúka ES-krøv og standardir innan framleiðslu og eru vit ivaleyst betur fyri her enn flestu ES-lond eru sjálv! Hesi vinnuni beri eg ongan banga fyri, Hergeir, – hon skal nokk klára seg í altjóða høpi.

At vit skulu verða nærmast avhøvdaðir orsaka av bíðitíð við ES-checkpoints og missa avtalur etc. orsakað av hesum, trúgvi eg ikki er fakta, – men um vit frá føroyskari síðu t.d. ikki hava havt nóg fullfíggjað útflutningsskjøl, váttanir etc. etc., so kann hetta møguliga geva onkrar trupulleikar við checkpoints hjá ES, og má hesin trupulleiki kunna loysast á »heimabana«.

Skilji á Hergeir, at arbeitt hevur verið við hesi ætlan síðani 1996 tí vinnan hevur rópt eftir hesi avtalu, tí annars skuldi allur føroyski útflutningurin komið í vanda?? Eri ikki sjálvur tann rætti at svara uppá hetta, men kanska onkur frá vinnuni sjálvari vildi gjørt okkum tann beina at lýst hendan trupulleika betur, – so vit betur kunnu skilja, hví vit endiliga skulu hava hesi ES-direktiv í gildi her.

*** Eg vil enn einaferð fasthalda at triðjalandsvøra, sum ikki kemur í nánd av ES-marknaðinum ikki eigur at fara ígjøgnum hetta BIP-punkt sum verður gjørt í Havn.***

***Eisini vil eg halda, at vinnan má hava møguleika at góðtaka ella avvísa vøru frá triðjalands skipum til virkingar á føroyskum virkjum, sjálvt um vøran er frá ikki ES-góðkendum skipum, – tí hetta verður praktiserað í sjálvum ES, so hví ikki eisini her??!!***

***Vit, sum hava í túsundavís av tonsum av bulk vøru í transit gjøgnum goymslur okkara, vilja eisini hava tryggjað at henda vøra, sum verður landað/umskipað í mongdum heilt frá nøkrum fáum 100 tonsum til kanska 2-3000 tons hvørja ferð, – verður kannað á respektivu støðum, har hon verður umskipað/landað, – tað er ikki meira enn rímuligt og annað verður ikki møguligt!!!***

Við vón um at tit politikarar taka hetta mál álvarsligt og endaliga greiða tað frá tykkum til frama fyri alla vinnuna.

*Tórshavn 16.06.2000*
**Johan Dahl**

# Færøerne er ikke et firma, men et land og et folk

I statsministerens forhandling med færingerne om selvstændighed tæller pengene selvfølgelig med, men der er noget, der er vigtigere. Det er folkenes selvrespekt, både her og der. Den nordiske udvikling gennem de sidste par hundrede år har sat respekten for folks selvbestemmelse højt. Norden er indtil 1800 et udelukkende dansk-svensk domineret område. Senere er folk efter folk dukket frem i det nordiske landskab og har skabt sig værdighed og respekt. Indadtil og udadtil. Det har været lykkeligt.

I Norge begyndte folket at skaffe sig plads igen i 1814 og blev selvstændigt i 1905. Finland blev selvstændig republik i 1919. Island proklamerede sin selvstændighed i 1944. Grønland, Færøerne og Ålandsøerne er i 1900-tallet blevet områder med selvstyre i udstrakt grad og er måske alle på vej mod selv stændighed.

For både Norden som helhed og for de enkelte folk har det været en i bund og grund god udvikling, selv om den stod i skærende kontrast til, hvad der samtidig skete på det europæiske kontinent. Der bankede man i samme tidsrum folk og stater sammen og har siden haft travlt med at udslette mindretal eller holde dem nede.

Selvfølgelig har selvstændighed med økonomi at gøre, men det ville være en skændsel, hvis en dansk regering for en nøjeregnende økonomis skyld fastholder en styring af et folk, der har lyst til at forsøge selv. Det må være vores historiske pligt at være villige til at lægge økonomien til rette, så færingerne får et rimelig frit valg. I denne tid, hvor statsselskaber og IT-virksomheder hveranden dag handles til milliarder, må det være ovrekommeligt. Hvad afhængighed og dominans ovenfra på trods af en folkelig vilje kan føre til af bitterhed og ødelæggelse, har vi for tiden nok av eksempler på i Europa. Hvad det koster af liv og penge og bitterhed uden at problemerne løses, er uoverskueligt. Vi bør i respekt for os selv, færingerne og Nordens historie gå en anden og langt bedre vej.

Hverken i denne færøsag eller de foregående er det let udefra at vurdere, hvad der egentlig foregår bag overfladen. Finder der mere eller mindre skjulte socialdemokratiske forhandlinger sted mellem Færøerne og Danmark, som vil infiltrere den officielle færøske linje nu, er det en brøler af rang. Skal sagen ende godt, er den hævet over partipolitiske bindinger.

Hvordan får man en dansk regering og statsminister at fatte, at det i den færøske sag ikke er tale om firmaforhandlinger, men om noget væsentligere. De folkelige kræfter er gennem lange tider blevet so reelt nedvurderede, at de måske ikke længere har plads i politikerhoveder. Måske kunne man så appellere til de mange flotte officielle erklæringer om mindretal, værdighed, sprog, ligestilling og menneskerettigheder, som for tiden med rund hånd drysses ned til os oppefra. Kunne det ikke være en statsministeriel ærgerrighed i praksis at vise, at ordene kan være mere end smarte formuleringer for magtpolitikken, når det gælder. I forhandlingen med færingerne nu, er der en mulighed for at vise, at en ordentlig statsminister er mere end en regnskabsfører og taktisk begavet partiformand.

**Jens Rosendal, Ballum**
**(Landsformand for Dansk Samling)**

# Vi siger alligevel farvel til så mange

Seinastu árini hava vit sum sjálvstýrandi tjóð, <u>har eingin uttanifrá hevur blandað seg</u>, megnað at vanrøkt okkara land og samfelag í den grad, at tað skulu íløgur gerast fyri 100-tals milliónir krónur næstu árini, bert fyri at koma á eitt rímiligt tíðarhóskandi støði fyri eitt framkomið samfelag.

Okkara góða gamla postverk var við at steðga, um ikki løgtingið í bráskundi gekk eini eykajáttan á møti. Sama skilið var innan Strandferðsluna, sum í seinastu løtu fekk eina eykajáttan til millum annað eitt óegnað avloysaraskip, áðrenn ”Smyril” bleiv lagdur.

Undantaksstøðan innan almanna- og heilsuverkið hevur staðið við í áravís. Fólkaskúlin hevði sítt fyrsta og harvið søguliga verkfall. Fiskivinnan hevur ikki ráð at endurnýggja seg o. s. fr.

**Loysa Føroyar, men ikki trupulleikarnar**

Hetta er ein hættislig støða at vera komin út í, men tað sum verri er, er at okkara hægsti politiski myndugleiki, við løgmanni á odda, í fullum álvara og púrasta skamleysur ferð eftir ferð leitar til Danmarkar í eini roynd at loysa Føroyar úr ríkisfelagsskapinum skjótast gjørligt, men treytirnar eru, at danir gjalda gildið tey fyrstu 15 árini.

**Fullveldi fyri útvald**

Ein av fullveldishøvdingunum í Suðri, Árni Brattaberg, fyrrverandi bóndi, er endurgivin fyri at siga við danskt blað: ”*jeg har aldrig modtaget en krone i løn i hele mit liv, men vi skal nok klare vores selvstændighed, spørgsmålet er bare hvor meget man skal have <u>for at nok er nok</u>*”.

Árni og vísmaðurin Herman Oskarson eru í sama blaði samdir um, at fáa vit fullveldi gerast fíggjarligu karmarnir trengri, og tað vil elva til eina fólkafráflyting, men sjálvt um vit verða 6 — 7.000 føroyingar færri, so er tað kortini prísin vert. ”*Vi siger alligevel farvel til så mange hvert eneste år*”.

So vita vit tað. Fullveldi Føroyar til tey útvaldu. Palleba skal ikki vænta sær tað stóra.

**Føroyar fyri allar føroyingar**

Í øllum hesum fullveldismøsninum hevur Sambandsflokkurin eina greiða støðu. Vit skulu varðveita ríkisfelagsskapin, hava felags grundlóg og somu ríkisborgararættindi. Vit skulu gerast meiri sjálvbjargin, og í felagsskapi varðveita og útbyggja okkara samfelag soleiðis, at komandi ættarlið fáa fjølbroyttar møguleikar. <u>Her skal vera gott at búgva, og eingin skal føla seg noyddan at rýma av landinum.</u>

**Flemming Mikkelsen**
**løgtingsmaður**

# Tørvurin er stórur

Tað fer fram eitt lutfalsliga umfatandi hjálpararbeiði úr Føroyum. Tað eru Samkoman Immanuel í Hoyvík, saman við felagsskapinum Beula í Rumenia, har føroyingar eisini skipa fyir, ið standa fyri hesi hjálp til tey, ið hava mestan tørv í økinum kring Timisoara í Rumenia.

Úr Rumenia fræ̃ttist nú frá Beula, at tað ið teimum í løtuni tørvar mest, er húskiráð, t.v.s. brúkslutir til húsarhaldini, so sum bestikk, grýtur, pannur, borðiskar, koppar, strúkijørn- og bretti, amboð o.s.v. Eisini hevði verið gott við leikum til børnini

Trupulleikin hjá familjum, ið farið verður til er, at tey sum oftast mangla hesar allar neyðugastu lutirnar í húsarhaldinum. Tey siga at nú í summarmánaðunum er kanska ikki so nógvur tørvur á klæðum, sum annars hava verið send úr Føroyum í stóran mun. Seinni uppá árið er tørvurin aftur meir á klæðum, serliga tí at tað kann verða sera kalt í Rumenia um veturin.

Í Føroyum er tað sum sagt Samkoman Immanuel, ið stendur fyri hjálpararbeiðinum, við at skipa fyri innsavningum og at fáa vørurnar fram. Síðsti túrur til Rumenia var síðst í mai í ár, tá farið varð við bussi, fullur av klæðum, skógvum, hjálpartólum, sápu o.l. Ætlanin er at næsti túrur skal byrja 7. juli, og tá er sum sagt ætlanin at hava so nógv sum møguligt av húskiráði, bestikk og tað sum annars er nevnt fyrr.

Um onkur hevur hug at hjálpa til við hesum, ber til at seta seg í samband við Samkomuna Immanuel, ella fara framvið hjá teimum í Hoyvík, har lutirnir kunnu latast. Samkoman Immanuel og Beula í Rumenia takka hjartaliga fyri tað hjálpsemi, ið føroyingar vísa, og hava víst ígjøgnum árini, og vóna at hendan umbønin um lutir eisini verður tikin við vælvild.




Í býin - altíð eitt stað at fara

Streymoy

Kaggin
Hóskvøldið verður Live Rock kvøld
Fríggja- og leygarkvøldið spæla ROOSTERS
Køkurin er opin fríggja- og leygarkvøldið kl. 18.00-22.00
Borðbílegging á tel. 214170 og 314170
Kaggin
www.kaggin.fo
Sosialurin - 311820

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra
- so er tað 311234
AUTO
BENZIN
DIESEL
KIOSK
- ALT DØGNIÐ -
AUTO
311234

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

Norðoyggjar

Klaksvíkar Klubbi
Dansur við plátuvendara verður leygarkvøldið 24. juni
Klubbin hevur:
POOLBORÐ
BILLARDBORÐ
ENSKAN FÓTBÓLT Á SKY

fk Matseðilin
Hósdagin 22. juni: Kotelettir
Fríggjadagin 23. juni: Kálvafrikassé
Leygardagin 24. juni: Rullisteik
Mánadagin 26. juni: Gjørd hara
Týsdagin 27. juni: Knettir
Mikudagin 28. juni: Grýturættur
Kostnaður 30,- kr.
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari ella Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík

Eysturoy

EYDNAN á Oyrarbakka
Dansur verður leygarkvøldið 24/6
GEORG og BERGMENN spæla
EYDNAN

Lesið sosialin sosialin sosialin -tað loysir seg

Norðurlandahúsið í Føroyum
Sí SVF tekstvarp s. 650

sosialurin
www.sosialurin.fo

Long drinks Café
CLEOPATRA
Við gongugøtuna
www.marcopolo.fo
Opið er:
Mán.–Hós. kl. 17.00 – 23.30
Fríggjadag kl. 17.00 – 03.30
Leygardag kl. 17.00 – 03.30
Sunnudag kl. 17.00 – 23.30

Vilja tygum vi› í
Í b‡in - hvønn hósdag
Ynskja tygum at l‡sa í teiginum *í b‡in*, so fylli› út henda lepan og sendi› hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur

DAGFØR
TEG
HALT
SOSIALIN
Tekna teg sum haldara nú, so fært tú Sosialin ókeypis restina av hesum ársfjórðinginum

Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*
Restina av hesum ársfjórðingi fái eg Sosialin *ókeypis!*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.